**Advokatskrivstovan**

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fróða Patursson, adv.
Óla Jákup Kritoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen
Fr. Petersensgøta 9 • 100 Tórshavn
Tlf. 311145 • Fax 311525
e-mail: jura.@jura.fo

# Til sølu

Vegna Sp/f Lyftútleigan undir konkurs verða hesar ognir lýstar til sølu:

- Scania 92 lastbilur við krana, árg. 1988, skrás. nr. JM 780
- Scania 113 H lastbilur uttan krana, árg. 1991, skrás. nr. VM 587
- BMW 324 persónbilur, árg. 1990
- Ein bingja

# Til sølu

Vegna P/f Vestfelli undir konkurs verða skip felagsins lýst til sølu:

„Vesthav" OW 2038, BT 306 og NT 107
„Vestfisk" OW 2363, BT 189 og NT 59
„Vestborg" XPUA, BT 160 og NT 48

Skipini verða lýst til sølu undir einum og fyri eitt samlað boð. Møgulig boð skulu vera undirritaða í hendi saman við treytaleysari váttan um fígging í seinasta lagi fríggjadagin 10. februar 2006, kl. 12.00. Fyrivarni verður tikið fyri at velja og vraka millum innkomin boð.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, e-mail ojk@jura.fo ella Elin Svínoy, e-mail els@jura.fo

# Søkt verður eftir

fólki til Dagtilhaldið á Strondum at byrja 1. mars 2006.

Arbeiðstíðin verður 10 tímar um vikuna, við eini royndartíð til 30. juni 2006.

Nærri fæst at vita um starvið á tlf. 447158.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2006.

**Sjóvar kommuna**

Skúlavegur 10 · 490 Strendur

# Søkt verður eftir

**fólki til alibrúk okkara á Fuglafirði**

Í sambandi við nýggja útseting av sílum á Fuglafirði, verður við hesum søkt eftir tveimum røskum fólkum. Einum alara og einum alaralærlingi.

**Alari**
Til starvið sum alari er tað ein fyrimunir, um tú hevur royndir at arbeiða við aling, men er hetta tó ikki nøkur treyt. Hevur tú eginleikar sum nærlagni, røkiskap, evni til at samskifta og í felagsskapi at røkka settum málum, so er tað tær vit møguliga leita eftir. Væntað verður at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, dugir at nýta bát og hevur ein ávísan førleika í at arbeiða við togverki. Arbeiðið er vanlig arbeiðstíð, umframt at tú kemur at verða í eini vaktarskipan. Løn sambært avtalu.

**Alaralærningur**
Hevur tú áhuga í at útbúgva teg sum alara, so er ein spennandi møguleiki her. Væntað verður, at tú ert sjálvstøðugur, arbeiðssamur, røkin og hevur stóran áhuga í at arbeiða við livandi fiski. Læran er skipað við praktiskum arbeiði og við skúlagongd á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Høvuðsarbeiðið er røkt av fiski, men tú kemur eisini at arbeiða við togverki og neti, umframt øllum tí tekniska útbúnaðinum, ið er á alistøðini. Løn sambært sáttmála.

Um hetta er nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum skjótast gjørligt til:

**Vestlax**
Postboks 82, 410 Kollafjørð,
Fax 477002, Tlf. 477000 ella
e-mail: leif@vestlax.fo

Umsóknarfreist: 8. februar 2006

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

| | |
|---|---|
| Opið er: | Børkuvegur |
| mánadag-hósdag frá kl. 9-16 | 620 Runavík |
| fríggjadag frá kl. 9-12 | Tlf. 448480 |

# HÚS Í TRONGISVÁGI TIL SØLU

**um hóskandi boð fæst, matr.nr 144k í Trongisvági.**

**Nærri fæst at vita á tel 372 201 ella 272 662**

# Sølufólk

Vegna økt virksemi, søkir **Vónin Tórshavn** eftir dugnaligum sølufólki til okkara uttanlandamarknað.

Arbeiðið er sera spennandi og fjølbroytt og fevnir um allar tættir innan sølu av botn- og rækjutrolum. Tað verður tín uppgáva at styrkja sambandið við viðskiftafólk okkara uttanlanda, eins og tú skipar samband við nýggjar kundar.

**Førleiki**
Tann, sum settur verður, má vera kønur í norðurlendskum og enskum máli, vera vanur við telduarbeiði og eigur at vera førur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.

Tað er umráðandi at tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og kann loysa uppgávur sjálvstøðugt og hevur evni til at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar.

Vit ímynda okkum, at tú hevur kunnleika til trol, men hetta er einki krav.

**Starvstreytir**
Lønarviðurskifti og setanartreytir verða sambært avtalu við leiðsluna.

**Umsókn**
Vilt tú vita meiri um starvið ert tú vælkomin at ringja til Eystein Elttør á telefon 47 42 14. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

Vónin Ltd.
Postboks 19
FO-530 Fuglafjørður

Umsóknarfreistin er 7. februar 2006.

VÓNIN
-we make fishing more profitable

# Sandoyar Barnaverndartænasta

Við hesum verður søkt eftir leiðara til Sandoyar Barnaverndartænastu, sum umfatar kommunurnar í Sandoynni og Skúvoyar kommunu.

Starvið, ið er hálvtíðarstarv, verður at seta so skjótt sum gjørligt, eftir at umsóknarfreistin er úti - ella so skjótt sum tilber eftir uppsagnarfreist í einum verandi starvi.

Starvið krevur eina hóskandi, miðallanga útbúgving. Um umsøkjarin harumframt hevur royndir innan barnaverndarøkið, er tað ein fyrimunur.

Skrivstovan hjá Barnaverndartænastuni verður í Húsavík.

Starvið verður lønt eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og freistin at søkja er úti 11. februar 2006.

Umsóknirnar skulu stílast til:

**Sandoyar Barnaverndartænastu**
v/ Hanusi undir Leitinum
230 Húsavík